# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Skuldsetingarnar eru so ófatiligar, at Putin kann ikki gera viðmerkingar til tær*

*talsmaður forsetans*

# Eitraði njósnarin deyður

**Tann 43 ára gamli russarin Alexander Livinenko doyði í gjárkvøldið á sjúkrahúsi í London, eftir at hann var vorðin eitraður**



*Alexander Livinenko avmyndaður á sjúkrahúsinum í London.*

- Hasi svínini gjørdu av við meg, segði Alexander Livinenko í samrøðu við vinmannin Andrej Nekrasov, og sum verða endurgivin í bretska blaðnum The Times í dag.

Tann 43 ára gamli fyrrverandi KGB-maðurin varð lagdur inn á eitt lítið sjúkrahús í London tann 1. november, og sjúkueyðkennini bendu á, at hann var vorðin eitraður. Tann 17. bleiv hann fluttur til University College Hospital. Læknarnir har fingu beinan vegin illgruna um, at Alexander Livinenko var eitraður við tungevninum tallium, men teirri metingini sleptu teir kortini seinni.

- Læknarnir gjørdu alt fyri at bjarga lívi hansara, men tað eydnaðist tíverri ikki, segði talsmaðurin hjá sjúkrahúsinum í gjárkvøldið.

Alexander Livinenko fanst fleiri ferðir at russiska forsetanum, Vladimir Putin, og nú hann legðist sjúkur, var hann í ferð við at kanna, hvør gav boð um at myrða tíðindakvinnuna Onnu Politkovskaja fyri hálvum øðrum mánað síðani.

Oleg Gordievskij, sum er fyrrverandi yvirmaður í KGB, og sum hevur búð í Bretlandi síðani miðskeiðis í áttatiárunum, sigur, at hann er ikki ovfarin av tí, sum hendi Livinenko, og hann ivast ikki í, at tað var russiska trygdartænastan, sum beindi fyri honum.

- Teir hava koyrt eitt sera vandamikið eitur í teið, sum hann drakk, og hetta var eitt gott dømi um, hvussu KGB beinir fyri sínum fíggindum, sigur Oleg Gordievskij við The Times.

Nakrar tímar áðrenn Alexander Livinenko gjørdist sjúkur, hevði hann drukkið te saman við tveimum russarum á einum hotelli í miðbýnum í London. Haðani fór hann á eina matstovu at hitta ein italskan granskara.

### Fanst at Putin

Alexander Livinenko flýddi úr Russlandi og fekk politiskt friðskjól í Bretlandi, eftir at hann hevði lagt russisku trygdartænastuna FSB undir at hava lagt ætlanir um at beina fyri russiska vinnulívsmanninum Boris Berezovskij. Livinenko vildi eisini vera við, at Kreml hevði skipað fyri yvirgangi í Moskva, men givið kekenum skyldina.

Vladimir Putin, forseti, var staddur í Helsingfors á fundi millum ES og Russland, tá deyðsboðini av Alexander Livinenko komu. Talsmaðurin hjá Putin segði, at talan var um eina menniskjaliga vanlukku.

- Ein maður er vorðin eitraður, men skuldsetingarnar ímóti Kreml eru so ótrúligar og ófatiligar, at forsetin kann ikki gera viðmerkingar til tær, segði talsmaðurin hjá Putin.

# Lýggja veðrið trýstir oljuprísin

**Tað er rættiliga lýtt í USA eftir árstíðini, og tað trýstir oljuprísin niður**

Oljuprísurin hevur verið fallandi teir seinastu dagarnar, og fallið helt fram á marknaðunum í morgun, soleiðis at ein tunna av norðsjóvarolju, sum skal latast í januar, kom niður á 59,3 dollarar.

TDN Finans skrivar, at fallið kemst av tí lýggja veðrinum í USA, og at nýggjar forsagnir hjá amerikonsku veðurmonnunum siga, at amerikanararnir kunnu vænta sær ein lýggjan vetur hesaferð. Tí minkar eftirspurningurin, og tað fær prísin at fella.

Marknaðarserfrøðingarnir eru ikki á einum máli um útlitini. Summir vænta, at avgerðin hjá OPEC-londunum at skerja framleiðsluna fer at avmarka prísfallið, og 17 serfrøðingar, sum Bloomberg hevur tosað við, eru ymsikir á máli. Nakrir vænta, at prísurin fer at hækka aftur í næstu viku, nakrir siga, at hann fer at standa í stað, og uppaftur aðrir vænta, at fallið fer at standa við.

Tað, sum serfrøðingarnir siga, minni enn so altíð eftirfarandi. Síðani Bloomberg byrjaði at spyrja seg fyri hjá serkunnleikanum eina ferð um vikuna, hava spámenninir mistikið aðru hvørja viku.

## STUTT SAGT

### Vænta vatnflóð

Tað hevur regnað illa har suðuri í Noregi teir seinastu tíðina. Nógvar áir eru farnar upp um áarbakkarnar, og myndugleikarnir siga, at stórur vandi er fyri vatnflóð nógvastaðni um vikuskiftið. Tí hava teir sent út ávaring í vatnflóð í Telemark, Buskerud, Østfold, Oslo og aðrastaðni. Myndugleikarnir siga, at nógvastaðni er vandi fyri, at vegirnir fara at standa undir í vatni, og at hetta helst fer at gera seg galdandi í bygdum og býum. Í støðum verður vatnflóðin helst tann størsta seinastu fimm árini.

### Klárt til kríggj

Teir víðgongdu islamistarnir, sum hava tikið ræðið í meginpartinum av Somalia, hótta við at fara í heilagt kríggj við grannalandi Etiopia, tí etiopiska stjórnin styðjar somalisku stjórnina, sum islamistarnir berjast við. Tað fekk í gjár etiopiska forsætisráðharran, Meles Zanawi, at siga, at etiopiski herurin hevur fyrireikað seg og er nú til reiðar at fara í kríggj við islamistarnar. Hann legði afturat, at eftir hansara tykki kann kreppan ikki loysast við samráðingum. Nógvir eygleiðarar stúra fyri, at tað hvassa orðalagið kann enda við einum veruligum kríggi.

### Trussu-tjóvur tikin

Amerikanska løgreglan hevur tikið ein mann, sum er skuldsettur fyri at hava stolið undirklæðir frá nógvum kvinnum. Løgreglan sigur, at maðurin breyt inn í minst sjey íbúðir í statinum Iowa, og at hann stjól øll kvinnuundirklæðini, sum hann kom framá. Men mánadagin varð maðurin tikin. Talsmaðurin hjá løgregluni í Iowa sigur, at tað er ikki á hvørjum degi, at hon hevur eitt tílíkt mál.